# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra systir okkara

**Jana Johannesen**
á Skála

andaðist á Sambýlinum á Skála leygardagin 21. juni, 82 ára gomul.
Jarðarferðin verður týsdagin 24. juni kl. 14.00 úr Skála kirkju. Sálmabókin verður nýtt.

*Familjunna vegna*
**Erhard, Hjalmar og Greta**

Tey, ið vilja minnast Janu, kunnu lata Sambýlinum eina gávu, konta í Norðoya Sparikassa.

## Tøkk



Øllum tykkum sum komu inn á Parnassið at heilsa mær á móttøkuni 13. juni 2008 og tykkum, sum í aðrar mátar hava borið mær heilsanir, takki eg hjartaliga.
Tøkk fyri góðynski, blómur og gávur.

Somuleiðis tøkk fyri vøkur og fløvandi orð, og góða tónleikaframførslu í stásiligum umhvørvi.

Við tøkk fyri eina ógloymandi starvstíð, fyri gott vinalag, og við bestu ynskjum til starvsfólkið og stýrið um alt tað besta framtíðini.

**Vinarliga**
**Jóannes Dalsgarð**

# Próvtøka á Føroya Læraraskúla



Fríggjadagin 20. juni 2008 varð ein flokkur av lærarum útskrivaður av Føroya Læraraskúla.

**Fremra rað f.v.:** Tór-Ingar Akselsen, Astrið Breckmann, Eyvind Akraberg Hansen, Katrin Jákupsdóttir Hansen, Hansa Høj, Elly Johannesen, Fridrikka Kjeld, Aleth Lamhauge, Høgni Lamhauge.

**Aftara rað f.v.:** Rúni Arge Mortensen, Durita Eldevig Olsen, Rakul Petersen, Kristianna Poulsen, Kári Sverrisson, Birna Vestergaard, Eyðna Vidtfeldt, Guðný Wardum og Mirjam Zachariasen. Lív Vilhelmsen vantar á myndini.

# Heilsuhjálparar fingið prógv



Tann 9. mai 2008 fingu hesir 16 heilsuhjálparir prógv handað á Heilsuskúla Føroya.

**Aftara rað f.v.:** Tove Maria Ehlers, Sørvágur, Sonja Davadóttir, Streymnes, Osla Sørensen, Norðdepli, Súsanna Hansen Norðagøta, Kristina Ellingsgaard, Strendur, Sólmai í Lágabø, Vágur, Jóna Zachariassen, Eiði, Ann Tausen, Hvalba, Hansa Holm, Tvøroyri, Jean Gudmundarson, Hvalba og Hanna F. Hansen, Saltangará.

**Fremst f.v.:** Sigrid Andreasen, Tvøroyri, Kára Rasmussen, Strendur, Tania Bjartalíð Sandur, Ella Olsen, Árnafjørður, og Mariann Petersen, Tórshavn.

**Dagurin**
**24. juni. Jóansøka**. Føðingardagur Jóhannes Doyparans. Minningardagurin hjá halgimennum var vanliga deyðadagur teirra, men hjá Johannes Doyparanum er tað føðingardagurin, ið verður hildin, av tí at hann var heilagur longu í móðurlívi.